TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 27.04.2023 kl. 17:00
**Málnr.:** 20/00367

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer, Kristina Roest, Súsanna Bertholdsen

Varalimir: Jens Arni Leo Hammerfoss

Ikki møtt: Súsanna Bertholdsen

Onnur:

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

## Málsyvirlit

### Til støðutakan

| | | |
|---|---|---|
| 28/23 | 22/00489-4 | Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul 2023 |
| 29/23 | 23/00079-1 | Kommunusamanlegging -arbeiðsbólkurin -onnur viðgerð av eykajáttan |
| 30/23 | 21/00089-8 | Krani á kaiini |
| 31/23 | 23/00124-5 | Mótmæli -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -Rósing Rasmussen adv. |
| 32/23 | 23/00125-3 | Mótmæli og broytingaruppskot -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -Livilig Kor |
| 33/23 | 23/00071-5 | Uppskot um broyting av byggisamtykti - viðkan av havnarlagnum - februar 2023 |
| 34/23 | 22/00178-9 | Umsókn um broyting av byggisamtykt - bygging á matr. nr. 68 í Tjaldavík, sunnan fyri gamla landsvegin. |
| 35/23 | 23/00123-2 | Lukka mál: |

### Til kunningar

| | | |
|---|---|---|
| 9/23 | 23/00044-1 | Skattatøl 2023 |
| 10/23 | 23/00141-2 | LUM -Kanning av barnaverndartænastunum 2022 |
| 11/23 | 21/00149-2 | Lukka Mál: |

| 12/23 | 21/00536-2 | Lukka mál: |
|---|---|---|
| | | |
| | | |

Kristin Michelsen, borgarstjóri setur fundin, og kunnar um, at Súsanna Bertholdsen, ið er vald fyri lista C Javnarflokkin í Tvøroyrar býráð til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 hevur fráboðað farloyvið til býráðsfundin.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkalla Eyð Eidesgaard, ið er fyrst (1) valdi varalimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. nov. 2020 at møta til býráðsfundin. Eyð Eidesgaard fráboðar, at hon ikki kann møta til býráðsfundin 27. apríl 2023.

Kommunustjórin hevur eftir áheitan av borgarstjóranum innkalla Jens Arni Hammerfoss Leo, ið er næst (2) valdi varalimurin á lista C Javnarflokkurin til kommunustýrisvalið 10. Nov. 2020. Jens Arni Hammerfoss Leo hevur fráboða, at hann kann møta til býráðsfundin.

Jens Arni Hammerfoss Leo hevur frammanundan havt sæti í býráðnum og tekur sostatt sæti til býráðsfundin 27. apríl 2023.

Kristin Michelsen, borgarstjóri lesur skránna og kunnar um, at tríggjar (3) broytingar eru í skránni.

1. **Nytt mál á skrá:** «22/00178 Umsókn um broyting av byggisamtykt - bygging á matr. nr. 68 í Tjaldavík, sunnan fyri gamla landsvegin»
2. **Mál tikið av skrá:** «23/00149 Kunningasrstovan –starvsfólk»
3. **Mál tikið av skrá:** "23/00154 Tvøroyrar Kommuna -Roknskapur 2022"

Kristin Michelsen, borgarstjóri spyr um viðmerkingar eru til skránna --ongin viðmerking.

**Til støðutakan**

**28/23**
**22/00489-4 Føroya Eftirskúli -umsókn um stuðul 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Mentanarnevndin | 23.01.2023 | 4/23 |
| 2 Mentanarnevndin | 13.02.2023 | 13/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 12/23 |
| 4 Mentanarnevndin | 18.04.2023 | 35/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 23/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 28/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 04.01.2023**
Umsitingin hevur móttikið umsókn um stuðul frá Føroya Eftirskúla til virksemið skúlaárið 2023.

Skúlastjórin skrivar í umsóknini at:

> *Tvøroyrar Býráð hevur verið virkin stuðul av Føroya Eftirskúla síðan skúlabyrjan 2020 og hevur árliga latið 400.000 kr í stuðli!*

Upplýst verður, at tørvur er á stuðul svarandi til kr. 400.000,-

- *Hølisleigu á Sjógøtu 2, ljós og hita* kr. 200.000,-,
- *Nýskapandi virksemið og rakstur* kr. 200.000,-

Býráðið hevur hin 30. juni 2022, samtykt einmælt at veita stuðul til Føroya Eftirskúla fyri skúlaárið 2022/2023 á kr. 200.000,-, ið verður fluttur av játtan FÆ2022, §418.

**Lógargrundarlag:** Kommunufulltrúin og Løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar.

> *Kapittul 6. Fígging av rakstri og íløgum*
>
> *§ 17. Virksemið hjá eftirskúlunum verður lutvíst fíggjað við stuðli, sum landsstýrismaðurin og kommunurnar útvega. Ítestandi fígging skal útvegast við næmingagjaldi og/ella privatum stuðli.*
>
> *Stk. 2. Landskassans partur er:*
>
> *1. Til allar rakstrarútreiðslur, heruppií útreiðslur til løn til skúlaleiðara, lærarar og onnur starvsfólk, ljós og hita, leigu, viðlíkahald, undirvísingartilfar, trygging o.s.fr. verða latin í mesta lagi 70% av kostnaðinum.*
>
> *2. Til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla verða eftir landsstýrismansins góðkenning sum rentu- og avdráttarfrítt lán latin í mesta lagi 50% av virðinum eftir virðismeting*

**Fíggjarligar avleiðingar:** Avsett á FÆ2022 418, Eftirskúlin í alt kr. 400.000,-, har av leigugjald fyri Sjógøtu 2, kr. 153.562,-

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið mentanarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Mentanarnevndin 23. januar 2023:**
Einmælt samtykt ikki at veita stuðul fyrr enn roknskapur fyri ár 2022 er móttikin, og at skúlastjórin í Føroya Eftirskúla møtur til hoyring á næsta fundi í mentanarnevndini. Málið verður tikið upp til nýggja viðgerð tá roknskapur 2022 er móttikin.

**Kommunustjórin 08. januar 2023:**
Skúlastjórin á Føroya Eftirskúla heitur á Tvøroyrar Kommunu um at útgjalda stuðul fyri 2023, hóast at roknskapurin fyri 2022 enn ikki er liðugt grandskoðaður.

**Mentanarnevndin 13. februar 2023:**
Pól Arni Holm luttók á fundinum og upplýsir at 7. næmingar ganga á Føroya Eftirskúla skúlaárið 2022/2023. Til komandi skúlaár pr. d.d., hava 8 næmingar søkt um upptøku. Freistin at søkja 1. mai 2023 har næmingar skullu gjalda depositum. 8. fólk eru knýtt at skúlanum, har 2. fólk eru sett í fulla tíð. Jónleyg J. Bech mælir til at útseta málið um at veita stuðul til Føroya Eftirskúla, til løgtingsinsfíggjarlóg er viðgjørd og samtykt. Samtykt av Anitu Vibergsdóttir og Jónleyg J. Bech. Súsanna Bertholdsen atkvøddi blankt.

**Fíggjarnevndin 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá mentanarnevndini –málið verður tikið upp til nýggja viðgerð í mentanarnevndini.

**Kommunustjórin 12.04.2023:**
Umsitingin hevur hin 23. mars móttikið ársfrásøgn og grannskoðanarprotokoll fyri 2022 hjá Føroya Eftirskúla. Grandskoðanarátekningar eru til roknskapin, ið mælt verður til, at Føroyra Eftirskúli verður biðin um at rætta.

**Løgtingsfíggjarlóg 2023 er samtykt:**

7.23.2.10. Eftirskúlar (Stuðulsjáttan)

Sambært løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar, við seinni broytingum, verður studningur latin eftirskúlum. Skúlaárið 2022/2023 eru tveir eftirskúlar góðkendir at halda fram við virksemi sambært eftirskúlalógini; ein á Tvøroyri og ein í Skálavík. Býtið av játtanini á undirkontur er vegleiðandi, og til ber at flyta ímillum í mun til upptøku av næmingum.

Undirkonta 01. Eftirskúlin á Tvøroyri
Føroya eftirskúli er sjálvsognarstovnur, sum er staðsettur á Tvøroyri. Sambært viðtøkum skúlans er endamálið at reka eftirskúla sambært eftirskúlalógini og at bjóða undirvísing, ið samsvarar fólkaskúlalógina og grundhugsjónina hjá eftirskúlanum. Ovasta leiðsla er eitt stýri við 6 limum. Skúlastýrið setir leiðara fyri skúlan. Rakstur skúlans er fíggjaður við almennum stuðli sambært eftirskúlalógini, foreldragjaldi og við øðrum stuðli. Landið letur skúlanum stuðul eftir umsókn. Stuðulin verður útgoldin ákontu. Grannskoðaður roknskapur verður latin Undirvísingarstýrinum eftir lokið fíggjarár.

**Sundurgreinað ætlan**

| Tús. kr. | 2020 R | 2021 R | 2022 J | 2023 F | 2024 Æ | 2025 Æ |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Útreiðslur | 3.066 | 6.324 | 7.266 | 7.405 | 7.405 | 7.405 |
| Inntøkur | 182 | 334 | - | - | - | - |
| **01. Eftirskúlin á Tvøroyri** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.247** | **2.315** | **3.030** | **3.600** | **3.600** | **3.600** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.247 | 2.315 | 3.030 | 3.600 | 3.600 | 3.600 |
| **Inntøkur** | **47** | **96** | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *47* | *96* | - | - | - | - |
| **02. Eftirskúlin í Skálavík** | | | | | | |
| **Útreiðslur** | **1.820** | **4.009** | **4.236** | **3.805** | **3.805** | **3.805** |
| 54. Stuðul til annað virksemi | 1.820 | 4.009 | 4.236 | 3.805 | 3.805 | 3.805 |
| **Inntøkur** | **136** | **237** | - | - | - | - |
| 77. Flyting frá kommunum | *136* | *237* | - | - | - | - |

7.23.2.11. Eftirskúlin í Suðuroy. løgustuðul (Stuðulsjáttan)

Undirvísingarvirksemið á eftirskúlanum á Tvøroyri byrjaði skúlaárið 2020/21. Raksturin av skúlanum er fíggjaður við almennum stuðli sambært løgtingslóg nr. 83 frá 17. mai 2000 um eftirskúlar. Fyri at betra um hølisviðurskiftini eru í fíggjarlógini fyri 2022 játtaðar 750 tús. kr. til verkætlan at útvega ein skúlabygning til eftirskúlan á Tvøroyri. Sambært § 17, stk. 2 í lógini um eftirskúlar kann landsstýrismaðurin lata stuðul sum rentu- og avdráttarfrítt lán til keyp av húsum, bygging ella um- og uppíbygging av húsum til eftirskúla. Stuðulin kann í mesta lagi verða 50% av virðinum eftir virðismeting.

Í 2023 er eingin játtan til endamálið.

**Mentanarnevndin 18. april 2023:**
Einmælt samtykt at lata í stuðul til Føroya Eftirskúla á kr. 200.000,- við áheita á umsitingina, at fáa í lag fund við mentamálaráðið, fyri at fáa ein lýsing av hvørjar ætlanir eru við Føroya Eftirskúla framyvir, soleiðis at Tvøroyrar kommuna ikki framhaldandi og áhaldandi ber rakstrinum av Føroya Eftirskúla.

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 27. april 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið frá Mentanarnevndini at veita Føroya Eftirskúla stuðul á kr. 200.000,- skúlaárið 2023.

Einmælt samtykt at heimila umsitingini, at fáa í lag fund við Mentamálaráðið, fyri at fáa ein lýsing av hvørjar ætlanir eru við Føroya Eftirskúla framyvir, soleiðis at Tvøroyrar kommuna ikki framhaldandi og áhaldandi ber rakstrinum av Føroya Eftirskúla.

**29/23**
**23/00079-1 Kommunusamanlegging -arbeiðsbólkurin**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 19/23 |
| 2 Býráðið | 30.03.2023 | 20/23 |
| 3 Býráðið | 27.04.2023 | 29/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 02.02.2023**
Arbeiðsbólkurin, ið umboðar tær tríggjar kommunurnar í Suðuroynni Hvalba, Fámjin og Tvøroyri, sum hava samtykt at kanna fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni, hevði fyrsta fundin í býráðssalinum á Tvøroyri 2. mars 2023, og tey 6 valdu umboðini í arbeiðsbólkinum skipaði seg soleiðis:

- Róin Schrøder, form. *–valdur í arbeiðsbólkin av Hvalbiar bygdaráð*
- Doris Bjarkhamar, næstforkv. *–vald í arbeiðsbólkin av Tvøroyrar býráð*
- Ólavur Rasmussen, skrivari. *–valdur í arbeiðsbólkin av Hvalbiar bygdaráð*
- Eyðdis Ellendersen, nevndarlimur. *–vald í arbeiðsbólkin av Fámjins bygdaráð*
- Herit Albinus, nevndarlimur *–vald í arbeiðsbólkin av Tvøroyrar býráð*
- Niels Jákup Trúgvason Nielsen, nevndarlimur. *–valdur í arbeiðsbólkin av Fámjins bygdaráð*

**Tilgongdin til arbeiðsbólkin:**

**Tvøroyrar Kommuna**
Tvøroyrar býráðið hevur á fundi 6. september 2022 einmælt samtykt, at heimila Kristin Michelsen, borgarstjóra at taka stig til, at Tvøroyrar býráð heitur á hvørja einstøku kommunu í Suðuroynni um at velja limir í ein arbeiðsbólk, at viðgerða sjálvbodna kommunusamanlegging í Suðuroynni, og at geva borgarstjóranum heimild at hava fund við allar borgarstjórar í Suðuroynni at viðgerða uppskotið at velja limir í arbeiðsbólk, við uppskot til arbeiðssetning:

- *at hesin fremur eina lýsing av hvørjari kommunu sær av fyrimunum og vansum við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni, og at arbeiðsbólkurin orðar eina niðurstøðu, ið verður løgd til støðutakan hjá hvørjari kommunu sær innan 31.12.2023"*

**Fundur á Hamragarði 21. Sep. 2022 har allir borgarstjórar luttóku:**
Tilmælið og samtyktin á fundinum á Hamragarði hin 21. September 2022, kl. 18.30, har allir borgarstjórar og kommunuskrivarar vóru møttir, var:

- Full semja var millum allar borgarstjórar, at hesir hvør í sær leggja uppskotið fyri teirra kommunustýrið, hvørt kommunan ynskir at vera umboðað í arbeiðsbólkinum, ið skal lýsa fyrimunir og vansar við kommunusamanlegging í Suðuroynna.

- Og um kommunustýrið tekur undir við uppskotinum, velur hvørt kommunustýrið sær eitt umboð í arbeiðsbólkin, sum fær til uppgávu at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging.

- Kristin Michelsen mælti til, at raksturin av arbeiðsbólkinum verður fíggjaður eftir sama býtislyklið, sum er galdandi fyri BHS. Hetta var breið semja um, treyta av at kommunustýrið samtykti uppskotið.

**Eftirfylgjandi viðgerð av uppskotinum í hvørjari kommunu sær:**

**Hvalbiar Kommuna**

Hvalbiar kommuna hevur á bygdaráðsfundi 24.10.2022, einmælt samtykt at velja lim í arbeiðsbólk at kanna fyrimunir og vansar við uppskoti um sjálvbodna kommunusamanlegging.

**Fámjins Kommuna**

Fámjins kommuna hevur einmælt samtykt at velja fólk í samstarvsbólk at arbeiða við sjálvboðnari kommunusamanlegging í Suðuroynni.

**Vágs Kommuna**

Vágs Býráð hevur á fundi 26. september viðgjørt áheitanina frá Tvøroyrar kommunu. Vágs Býráð heldur, at hetta er alt og ógreitt, at taka støðu til. Vágs Býráð ynskir at borgarstjórarnir seta seg saman, at gera ein arbeiðssetning fyri arbeiðsbólkin.

**Sumbiar Kommuna**

Sumbiar kommuna hevði hesa áheitan fyri á fundi tann 02.10.2022. Og var einmælt samtykt, at útseta hettar mál, tí kommunustýrið meinar, at her er nógv sum er sera ógreitt.

**Porkeris Kommuna**

Á bygdarráðsfundi 24 oktober 2022 bleiv kunnað um uppskot um kommunusamanlegging í Suðuroy. Bygdarráðið metti á fundinum at málið ikki var búgvi til støðutakan, grunda á at ov fáir upplýsingar eru hesum viðvíkjandi.

**Hovs Kommuna**

Kommunustjórin hjá Tvøroyrar Kommunu hevur 20.12.2022 tosa við borgarstjóran í Hovi, sum upplýsir at kommunustýrið hevur umrøtt málið beint eftir fundin á Hamragarði, men enn ikki tikið endaliga støðu. Upplýst var, at bygdaráðið møguliga hevur ein fund seint í desember í ár, har málið møguliga verður viðgjørt.

**Tvøroyrar Kommuna**

Tvøroyrar býráð hevur á býráðsfundi 29. des. 2022 aftur málið á skrá, eftir at allar kommunurnar í Suðuroynni hava viðgjørt uppskotið um at velja lim í arbeiðsbólk at lýsa fyrimunir og vansar við sjálvbodnari kommunusamanlegging í Suðuroynni. Fyri at málið ikki skal steðgað upp, og fyri at koma víðari við ætlanina hjá teimum kommununum sum hava samtykt, at velja limir í arbeiðsbólkin, bleiv einmælt samtykt av Tvøroyrar býráð at:

- *at býráðið á Tvøroyri á fyrst komandi býráðsfundi, velur 2 limir í arbeiðsbólkin at lýsa fyrimunir og vansar við kommunu samanlegging.*
- *at mæla Hvalbiar Kommuna og Fámjins kommuna at velja 2 limir hvør í arbeiðsbólkin, ið fer til verka fyrst í komandi árið 2023.*
- *at heita á Hovs Kommunu, um at taka endaliga støðu við tilmælið um at velja 2 limir í arbeiðsbólkin.*

**Lógargrundarlag:**

- Løgtingslóg um kommunustýri, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 57 frá 30. april 2018
- Løgtingslóg nr. 12 frá 22. februar 2007 um sjálvbodnar kommunusamanleggingar og kommunal samstørv í sambandi við lógarbundnar uppgávur

**Fíggjarligar avleiðingar:** Kostnaðurin verður áleið 500tkr. Ongin ávís játtan er avsett á FÆ2023, og verður mælt til at veita eykajáttan. Mælt verður til býtislykil eftir fólkatalinum pr. jan. 2023, og at Tvøroyrar Kommuna í fyrsta umfari leggur út fyri arbeiðsbólkin, og at innheintingin verður at fara fram umvegis BSL.

| TVK | HVK | FAK | |
|---|---|---|---|
| 1774 | 666 | 79 | Fólk pr. 1.1.2023 |
| 70,42 | 26,44 | 3,14 | % |
| 352.000,- | 132.000,- | 15.000,- | ~ 500.000,- |

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

**Fíggjarnevndin 23. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá at veita samsýning samb. uppskot hjá arbeiðsbólkinum. Málið verður beint í býráði.

**Býráðið 30. marts 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá fíggjarnevndini og játtanin verður veitt sum eykajáttan av innistandandi.

**Kommunustjórin 19. apríl 2023:**
Onnur viðgerð av eykajáttan.

**Býráðið 27. apríl 2023:**
Einmælt samtykt við aðru viðgerð at veita eykajáttan av innistandandi .

**30/23**
**21/00089-8 Krani á kaiini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 20.03.2023 | 9/23 |
| 2 Vinnu- og havnanevndin | 19.04.2023 | 17/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 26/23 |
| 4 Býráðið | 27.04.2023 | 30/23 |

**Málslýsing:**
Ragnar Groth hevur skrivað til kommununa, og vísir á, at kranin á molanum sum útróðrarmennirnir brúka at landa við er í ringum standi. Ein nýggjur kostar millum 200 – 400.000 kr.

**Vinnu- og havnanevndin 20. marts 2023:**
Umsitingin kallar inn til fundar við útróðrarmenn, útróðrarfelagið og Delta Seafood.

**Tekniska deild 17-04-2023**
Fundur var við Símun J. Nybo og Ragnar Groth ónsdagin 5. april.
Magnus Jespersen hevði forfall.

**Vinnu- og havnanevndin 19. april 2023:**
Samtykt at keypa krana fyri í mesta lagi 150.000 kr , og at gera avtalu við Delta um viðlíkahald og ábyrgd.

**Kommunustjórin 19. apríl 2023:**
Ongin játtan er avsett á FÆ2023 til keyp av krana til havnalagið. Mælt verður til at keypið verður viðgjørt til FÆ2024, ella fíggja av FÆ2023 annaðhvørt við flytan millum íløgujáttan §718 Tvøroyrar Havn ella við eykajáttan.

**Fíggjarnevndin 24. april 2023:**
Málið verður beint í býráðið

**Býráðið 27. april 2023:**
Borgarstjórin mælir til, at tilmælið frá Vinnu- og havnanevndin verður strika, og at býráðið ístaðin samtykkir uppskot frá stjóranum í Delta Seafood -dagft. 26. apríl 2023-, at Delta Seafodd keypur kranan og rekur kranan dagliga, meðan kommunan leggur streym, vatn, og gerð nýtt fundament til kranan, sum eisini má flytast nakað út á molan. -Einmælt samtykt.

Borgarstjórin mælir til, at vørugjald, sum verður landa umvegis kranan, og sum FMF krevur inn, tá bátar selja fiskin á FMF, framyvur verður inntøka hjá Delta. -Einmælt samtykt.

**31/23**

**23/00124-5 Mótmæli -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -Rósing Rasmussen adv.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 19.04.2023 | 14/23 |
| 2 Tekniska nevnd | 19.04.2023 | 23/23 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 19.04.2023 | 11/23 |
| 4 Býráðið | 27.04.2023 | 31/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.04.2023**
Umsitingin hevur hin 10. Apríl móttikið skriv frá Advokatskrivstovuni v/. Rósing Rasmussen adv., har fráboða verður vegna klient mótmæli móti uppskoti um broyting av byggisamtyktini fyri Tvøroyar kommunu - økið "D" á havnalagnum.

Tvøroyrar býráð samtykti hin 20. feb. 2023 uppskot um broyting av byggisamtyktum fyri Tvøroyrar Kommunu. Kunngerðin hevur síðan 22. feb. 2023 ligi alment frammi á kommunuskrivstovuni, og er eisini lýst í miðlum og í kunngerðablaði.

Advokatskrivstovuni v/. Rósing Rasmussen grundgevir fyri mótmælinum at:

> *Sum advokatur fyri , sum eigur ognirnar matr. nr. á Tvøroyri, skal eg við hesum mótmæla ætlaðu broytingini í byggisamtyktini fyri havnalagið (nevnt øki "D") á Tvøroyri.*
>
> *Verður útbyggingin framd sambært verandi ætlan, fer útbyggingin í stóran mun at oyðileggja liviumstøðurnar í ognini hjá*
>
> *Sethúsini hjá .*
>
> *Ognin liggur tætt við sjóvarmálan, og liggur tí sera væl fyri. Frá at hava havt eina fjøru niðanfyri húsini verða viðurskiftini sambært byggisamtyktini nú broytt soleiðis, at ein stórur virkisbygningur skal byggjast beint niðanfyri húsini hjá Sambært teirri ætlan, sum hevur sæð, so er eisini ætlanin at byggja ein stóran skorstein beint uttanfyri hús hennara.*
>
> *er av teirri áskoðan, at húsini eru verd at varðveita, og hon kundi hugsa sær, at ognin og økið kring ognina bleiv friðað.*
>
> *Tað sigur seg næstan sjálvt, at her er talan um eitt so stórt inntriv í ognarrættin hjá , tí tað verður nærmast ikki búgvandi í ognini verður nevnda útbygging framd. Allur dámurin av ognini hvørvur, og sama er galdandi fyri uttanumøkið.*
>
> *Eg fari tí vegna at heita á Tvøroyar Kommunu um at bera so í bandi, at útbyggingin ikki verður framd sum ætla, men at kommunan heldur finnur eina aðra meira skynsama loysn, soleiðis at inntrivið móti økinum, har ognin hjá liggur, verður minni.*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

> *§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnir frá kunngerðardegnum.*

**Viðmerking hjá umsitingini:**
Mælt verður til at fyriliggjandi mótmæli verður tikin við í málsviðgerðini hjá Tvøroyrar býráð, við niðanfyri nevndum viðmerkingum, vísandi til §6 í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

1. Fráboðast skal, at umsitingin metur at ætlaða broyting av byggisamtyktinum fyri Tvøroyrar Kommunu, er í fullum trá við Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

2. § 10. Góðkenda byggisamtykt skulu virða ikki bara teir, ið ognina eiga og nýta, men eisini teir, sum í henni eiga veð og aðrar, sum rættindi í henni hava, uttan mark fyri, nær ið hesi rættindi eru fingin.
    a. *Stk. 2.* Á einum øki, sum góðkend byggisamtykt umfatar, skal annars eingin ogn verða nýtt, verða bygd við nýggjum húsum ella verða umbygd ella sundurbýtt uttan samsvarandi byggisamtyktini.

3. § 10 a. 9) Avgerðir, sum kommuna hevur tikið sambært hesi løgtingslóg ella sambært byggisamtykt, kunnu kærast til Føroya Kærustovn innan 4 vikur eftir, at viðkomandi hevur fingið fráboðan um avgerðina

4. Havnaøkið "D" á Tvøroyri frammanundan útlagt sum verandi 80.000m$^2$ , og er her talan um eina økin á uml. 10% ella 8.422m$^2$.
5. Víðkanin av havnaøkinum "D" við 10% verður ikki mett at vera ein somikil stór broyting, at henda kemur at blíva oyðileggjandi fyri liviumstøðurnar í ognini hjá kærara.
6. Atkoman til ogninar hjá kærara verða ikki skerdar av ætlaðu broytingini.
7. Kærarin hevur ikki matr. mark mótvegis ætlaðu broyting av byggisamtyktini.
8. Fjarstøðan til nærmasta virkisbygning á havnalagnum er í dag um 30m. Eftir ætlaðu broyting verður henda fjarstøðan enn tann sama á uml. 30m, og verður broytingin tí ikki mett at oyðileggja liviumstøðurnar í ognini
9. Fjarstøðan til nærmastu fjørðu millum ognina hjá kærara (samb. kortal.fo) er í dag uml. 25m. Eftir ætlaðu broyting verður fjarstøðan til fjørðuna uml. 70m, og verður broytingin tí ikki mett at oyðileggja liviumstøðurnar í ognini.

Til støðutakan hjá Tvøroyrar Býráð er, hvørt lýsta kunngerðin, um broyting av byggisamtyktum fyri havnaøkið "D", og sum var samtykt av Tvøroyrar býráð 20. feb. 2023 stendur við. Ella um henda skal

tillagast og evt. broytast soleiðis at útbyggingin ikki verður framd sum lýst og ætla, men at kommunan heldur finnur eina aðra meira skynsama loysn, soleiðis at inntrivið móti økinum, har ognin hjá kærara, verður minni.

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu & havnanevndini og býráðnum til støðutakan.

**<u>Vinnu- og havnanevndin 19. apríl 2023:</u>**

Nevndin hevur viðgjørt mótmælið frá Rósing Rasmussen adv. vegna eigaran av .
Eisini hevur nevndin fingið frágreiðing frá Melcon ráðgevandi verkfr., við Sókn advokatar sum juridiskur ráðgevi.
Nevndin er samd í niðurstøðuni hjá Melcon ráðg. verkfr., at broytingin av byggisamtyktini ikki í sær sjálvum viðførir at stórt inntriv verður í ognina hjá kærara.
Í samband við byggimálsviðgerð og staðseting av skorsteini, verður fyrilit tikin fyri at finna eina skynsama loysn, soleiðis at inntrivið móti økinum, verður sum minst møguligt.
Tískil heldur nevndin fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og víðkan av havnarlagnum.
Umsitingin verður álagt at orða svar til mótmælið frá Rósing Rasmussen adv., sum tilmæli til býraðið.

**<u>Tekniska nevnd 19. apríl 2023:</u>**

Nevndin hevur viðgjørt mótmælið frá Rósing Rasmussen adv, vegna eigaran av .
Eisini hevur nevndin fingið frágreiðing frá Melcon ráðgevandi verkfr., við Sókn advokatar sum juridiskur ráðgevi.

Nevndin er samd í niðurstøðuni hjá Melcon ráðg. verkfr, og heldur fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og víðkan av havnarlagnum.
Umsitingin verður álagt at orða svar til mótmælið frá Rósing Rasmussen adv., sum tilmæli til býraðið.

**<u>Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. apríl 2023:</u>**

Nevndin hevur viðgjørt mótmælið frá Rósing Rasmussen adv, vegna eigaran av .
Eisini hevur nevndin fingið frágreiðing frá Melcon ráðgevandi verkfr., við Sókn advokatar sum juridiskur ráðgevi.

Nevndin er samd í niðurstøðuni hjá Melcon ráðg. verkfr, og heldur fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og víðkan av havnarlagnum.
Umsitingin verður álagt at orða svar til mótmælið frá Rósing Rasmussen adv., sum tilmæli til býraðið.

**Kommunustjórin 25. Apríl 2023:**
Umsitingin hevur orðað eitt uppskot til svarskriv við løgfrøðiligari ráðgeving sum tilmælið til býráði. Svarskrivið tekur støði í samtykt hjá Vinnu- og havnanevndini hin 19. apríl 23, Teknisku nevnd hin 19. apríl 23 og Trivnaðar- og umhvørvisnevndini hin 19. apríl 23, sum tilmæli til býráðsfund 27. apríl 23.

**Býráðið 27. apríl 2023:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælið frá Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini um at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum. -Einmælt samtykt.

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við uppskotið til svarskriv til Rósing Rasmussen, adv., ið umsitingin hevur orðað við løgfrøðiligari ráðgeving, eftir áheitan frá Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini. –Einmælt samtykt.

**32/23**

## 23/00125-3 Mótmæli og broytingaruppskot -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -Livilig Kor

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Vinnu- og havnanevndin | 19.04.2023 | 15/23 |
| 2 Tekniska nevnd | 19.04.2023 | 24/23 |
| 3 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 19.04.2023 | 12/23 |
| 4 Býráðið | 27.04.2023 | 32/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 12.04.2023**
Umsitingin hevur hin 4. apríl móttikið skriv frá bólkið nevndur Livilig kor á Tvøroyri, har fráboða verður, at bólkurin Livilig Kor mótmælir samtykt Tvøroyrar Býráðs hin 20. februar 2023, við kunngerð 22. februar 2023 um broyting av ætlaðu víðkan av havnalagnum 100m eystur úr verandi øki hjá Varðanum Pelagic.

**Livilig kor skriva í mótmælisskrivinum at:**

1. *Mótmæli:*

   *Mótmælt og átala verður:*

   a. *Lýsta broyting fyri Havnaøkið D á Tvøroyri við nýggjari áseting í almennu byggisamtyktini.*
   b. *Ætlaða staðseting av protein- (mjøl-) og lýsiverksmiðju við tilvísing til býarskipanir og byggisamtyktir frá 1984 og byggimálsviðgerðir fram til nú framløgdu kunngerð hjá Tvøroyrar Býráð.*

2. *Broytingaruppskot:*

   a. *Broytingaruppskot til staðseting av virkinum hjá Varðanum Pelagic, íroknað nærliggjandi ídnarøki og øki til umskipan / nýinnrætting av havnarlagnum á Tvøroyri.*

***Mótmæli frá Livilig Kor inniheldur útgreinandi skjøl:***

1. *Mótmæli og broytingaruppskot til samtykti Tvøroyrar Býráðs hin 20. feb. 2023 við kunngerð 22. februar 2023 um broyting av ætlaða víðkan av havnalagnum 100m. eystur úr verandi øki hjá Varðanum Pelagic.*
2. *Útgreinandi skjal 1:*
   - *Um býarskipan og byggisamtykt*
   - *Býarplanleggingin byrjar 1978 – liðugt 1984 og góðkend febr. 1990*
   - *Býarskipanir og byggisamtyktir: 1990-1995 / 2005 og 2007-2014 | 2011-2020 / 2012-2020*
   - *Broyting í byggisamtykt juni 2014*
3. *Útgreinandi skjal 2:*
   - *Serstøk byggisamtykt A1 fyri havnarøki á Tvøroyri*
   - *Serstøk byggisamtykt A2 fyri vinnuøki og havnarøki í Líðini*
4. *Kortskjal 1:*
   - *Serstøk byggisamtykt A1 fyri havnarøki á Tvøroyri*
   - *Serstøk byggisamtykt A2 fyri vinnuøki og havnarøki í Líðini*

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

*§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal*

*frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnir frá kunngerðardegnum.*

**Viðmerking hjá umsitingini:**
Mælt verður til at fyriliggjandi mótmæli verður tikin við í málsviðgerðini hjá Tvøroyrar Býráð, við niðanfyri nevndum viðmerkingum, vísandi til §6 í Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

10. Fráboðast skal, at umsitingin metur, at lýsta kunngerðin at ætlaða broytingin av byggisamtyktinum, ið Tvøroyrar býráð hevur samtykt 20. mars 2023, er í tráð við Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.
11. Havnaøkið "D" á Tvøroyri er frammanundan útlagt sum verandi støðd á 80.000m$^2$, og við ætlaðu víðkan, er talan um eina økin á uml. 10% ella 8.422m$^2$.
12. Víðkanin av havnaøkinum "D" við 10%, verður ikki mett at vera ein somikil stór broyting, at henda kemur at blíva oyðileggjandi fyri liviumstøðurnar á Tvøroyri.
13. Umsitingin metur, at fyriliggjandi broytingar uppskot, ið er innkomið frá Livilig Kor ikki er proportional við galdandi og góðkenda byggisamtykt fyri Tvøroyrar Kommunu
    a. Metingin hjá umsitingini er, at fyriliggjandi broytingar uppskot frá Livilig Kor, hevur somiklar og víðtøknar broytingar við sær, at talan verður mest sum um nýggjar byggisamtyktir fyri alla kommununa.

Til støðutakan hjá Tvøroyrar Býráð er, hvørt lýsta kunngerðin, um broyting av byggisamtyktum fyri havnaøkið "D", og sum var samtykt av Tvøroyrar býráð 20. feb. 2023 stendur við. . Ella um henda skal tillagast og evt. broytast soleiðis at útbyggingin ikki verður framd sum lýst og ætla, men at kommunan tillagar hesa samb. mótmæli og broytingaruppskoti frá bólkinum Livilig Kor:

1. *<u>Mótmæli:</u>*
   *Mótmælt og átala verður:*
   a. *Lýsta broyting fyri Havnaøkið D á Tvøroyri við nýggjari áseting í almennu byggisamtyktini.*
   b. *Ætlaða staðseting av protein- (mjøl-) og lýsiverksmiðju við tilvísing til býarskipanir og byggisamtyktir frá 1984 og byggimálsviðgerðir fram til nú framløgdu kunngerð hjá Tvøroyrar Býráð.*

2. *<u>Broytingaruppskot:</u>*
   a. *Broytingaruppskot til staðseting av virkinum hjá Varðanum Pelagic, íroknað nærliggjandi ídnarøki og øki til umskipan / nýinnrætting av havnarlagnum á Tvøroyri.*

**Viðmerkingar frá Teknisku Deild, 18-04-2023:**
Tvøroyrar kommuna hevur fingið mótmæli og broytingaruppskot frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri".

Talan er um eitt sera rúgvusmikið tilfar, sum er eitt sindur ringt at lesa, orsakað av at har verður 'skotið við spjaðandi høglum', og at nógv av innihaldinum kann virka óviðkomandi fyri ítøkiliga málið.

Í mótmælinum verður ikki víst á ítøkilig rættindi ella áhugamál hjá kærarunum, men grundarlagið er meiri yvirskipað, og tekur fyri givið, at ein víðkan av havnarlagnum og bygging av protein- og lýsiverksmiðju vil hava "eina røð av neiligum avleiðingum við sær".

Har verður ikki ført prógv fyri, at har verða neiligar avleiðingar, og har verður ikki tikið støðu til ítøkiliga tilfarið frá Varðanum Pelagic, sum hevur verið lagt fram alment.

Í mótmælinum og í broytingaruppskotinum eru fleiri faktuellar skeivleikar í mun til lóggávuna, og hvat ein byggisamtykt er.

- Tað verður framført, at tað er ásett í "Býarskipanarlógini", at kommunan skal orða og kunngera eina serstaka byggisamtykt – men hugtakið "serstaka byggisamtykt" kemur als ikki fyri í lóggávuni.

- Tað verður í tilfarinum framført , at kommunan eigur at hava eina býarskipan, eina almenna byggisamtykt og serstakar byggisamtyktir – men lógarkravið er einans, at allar kommunur hava eina góðkenda byggisamtykt, soleiðis sum Tvøroyrar kommuna hevur. Einans Tórshavn skal sambært lógini frá 1954 gera eina býarskipan. Men 15. apríl 2009 skrivar Innlendismálaráðið í viðmerkingum til Løgtingsmál nr. 171/2008: "Hóast ásetingarnar í § 1 í býarskipanarlógini, hevur Tórshavnar kommuna ongantíð fingið eina býarskipan góðkenda, og sama er galdandi fyri allar hinar kommunurnar."

- Har tykist í uppskotinum at vera tann grundleggjandi misskiljing, at ein byggisamtykt er virkandi afturút, og kann nýtast sum eitt amboð til at flyta bygningar sum longu eru bygdir lógliga.Men byggisamtyktin inniheldur einans karmar fyri framtíðina. Tvs. at sjálvt um økið har Varðin Pelagic liggur í dag, varð lagt út sum øki til mentan, so hevði tað ikki ávirkað núverandi bygningar og virksemi. Kommunan kann ikki tvinga Varðin Pelagic til at flyta, men einans steðga víðari útbygging.

Á einum øki í mótmælinum er tó nakað at umhugsa: Tað er rætt, at broytingin í D: Havnarøki verður galdandi fyri øll havnaøki í kommununi, og um tað ikki er ynskiligt ella ætlanin, hevði tað helst verið eitt hugskot at gera eitt nýtt havnarøki "D2", sum inniheldur ásetingarnar um bygging av goymslubrunnum og skorsteinum. D: Havnarøki broytir so navn til D1, men er annars óbroytt.

Viðheft er uppskot til orðing av "D2".

**Fíggjarligar avleiðingar: -**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið Vinnu & havnanevndini og býráðnum til støðutakan.

**Vinnu- og havnanevndin 19. april 2023:**
Nevndin hevur viðgjørt mótmælið frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri" .
Eisini hevur nevndin fingið frágreiðing frá Melcon ráðgevandi verkfr., við Sókn advokatar sum juridiskur ráðgevi.

Nevndin er samd í niðurstøðuni hjá Melcon ráðg. verkfr., at at størsti parturin av skjølinum lýsa søguna, eins og broytingar uppskot ikki kunnu metast at vera beinleiðis relevant fyri hesa broyting av byggisamtykt,sum Varðin pelagic søkjur um. Afturat eru partar sum heldur átti at verið tiknir upp ísv, sjálva byggimálsviðgerðina tá umsókn verður latin kommununi.
Tískil heldur nevndin fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum.
Tó so, at mælt verður til at tillaga orðingin í D: Havnarøki stk. 4 til:
«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»

Umsitingin verður álagt at orða svar til mótmælið frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri", sum tilmæli til býraðið.

**Tekniska nevnd 19. april 2023:**

Nevndin hevur viðgjørt mótmælið frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri" .
Eisini hevur nevndin fingið frágreiðing frá Melcon ráðgevandi verkfr., við Sókn advokatar sum juridiskur ráðgevi.
Nevndin er samd í niðurstøðuni hjá Melcon ráðg. verkfr., og tískil heldur nevndin fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum.

Tó so, at mælt verður til at tillaga orðingin í D: Havnarøki stk. 4 til:
«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»

Umsitingin verður álagt at orða svar til mótmælið frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri", sum tilmæli til býraðið.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 19. april 2023:**
Nevndin hevur viðgjørt mótmælið frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri" .
Eisini hevur nevndin fingið frágreiðing frá Melcon ráðgevandi verkfr., við Sókn advokatar sum juridiskur ráðgevi.
Nevndin er samd í niðurstøðuni hjá Melcon ráðg. verkfr., og tískil heldur nevndin fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum.

Tó so, at mælt verður til at tillaga orðingin í D: Havnarøki stk. 4 til:
«Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slík hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.»

Umsitingin verður álagt at orða svar til mótmælið frá bólkinum "Livilig kor á Tvøroyri", sum tilmæli til býraðið.

**Kommunustjórin 25. Apríl 2023:**
Umsitingin hevur orðað eitt uppskot til svarskriv við løgfrøðiligari ráðgeving sum tilmælið til býráði. Svarskrivið tekur støði í samtykt hjá Vinnu- og havnanevndini hin 19. apríl 23, Teknisku nevnd hin 19. apríl 23 og Trivnaðar- og umhvørvisnevndini hin 19. apríl 23, sum tilmæli til býráðsfund 27. apríl 23.

**Býráðið 27. april 2023:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælið frá Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini um at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum. –einmælt samtykt.

Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við uppskotið til svarskriv til bólkin Livilig Kor, ið umsitingin hevur orðað við løgfrøðiligari ráðgeving, eftir áheitan frá Vinnu- og havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini. –Einmælt samtykt.

33/23

**23/00071-5 Uppskot um broyting av byggisamtykti - viðkan av havnarlagnum - februar 2023**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Trivnaðar- og umhvørvisnevndin | 20.02.2023 | 5/23 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 13/23 |
| 4 Býráðið | 27.04.2023 | 33/23 |

**Málslýsing:**
Varðin Pelagic ynskir í skrivi dagf. 29-12-2022 at víðka virksemið, og hevur til tað endamál tørv á, at byggisamtyktin verður tillagað.

**Lógargrundarlag:**
Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022

**Tilmælið:**
Eftir áheitan frá Vinnu- og havnarnevndini,15-02-2023, og Tekniska nevnd, 15-02-2023, verður mælt til at broyta byggisamtyktina fyri Tvøroyrar kommunu soleiðis, at Havnarøki "D" verður víðkað 100 m eystureftir, har uml. 8422 m2 er uppfylt sjóøki, 1919 m2 verður broytt frá neystaøki "G", og uml. 233 m2 verður broytt frá miðstaðarøki "A". Sí viðhefta kort-tilfar, umframt yvirlit yvir matr. nr., ið verða umfatað av broytingini.

Eisini verður mælt til, at broyta ásetingarnar í byggisamtyktini soleiðis, at §29 Øki D: Havnarøki, stk. 4, verður orðað soleiðis: "Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir, herundir siloir og skorsteinar, vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins."

Broytingin er markað við gulum.

**Trivnaðar- og umhvørvisnevndin 20. februar 2023:**
Nevndin varð kunnað um ætlanina.

**Býráðið 20. februar 2023:**
Atkvøtt var um tilmælið hjá teknisku umsitingini.
Fyri eru: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Jónleyg Jespersen Bech, Bjarni Hammer og Kristina Roest
Atkvøtt ímóti eru: ongin
Atkvøtt blankt: Súsanna Bertholdeen
Tilmælið hjá teknisku umsitingini er harvið samtykt

**Kommunustjórin 15. apríl 2023:**

Kunngerð um broyting av byggisamtykt fyri havnaøkið "D" hevur ligið alment frammi til eftirlit á kommunuskrivstovuni samb. Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

*§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnir frá kunngerðardegnum.*

Innkomin eru 2 mótmælir, har annað teirra eisini inniheldur broytingaruppskot:

- 23/00124 Mótmæli -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -Rósing Rasmussen adv.
- 23/00125 Mótmæli og broytingaruppskot -til uppskot um broyting av byggisamtykt - viðkan av havnarlagnum -Livilig Kor

**Tilmælið:**

1. Tvøroyrar býráð verður at taka støðu til, hvørt ætlaða broytingin av byggisamtyktini fyri havnaøkið "D" skal fremjast og sendast landstýrismanninum til góðkenningar sum henda er samtykt av býráðnum 20. februar 2023 og eftirfylgjandi hevur ligið alment frammi til eftirlit, vísandi til Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.
    a. *§ 6. 1) Stk. 2. 1) Innkomið mótmæli og broytingaruppskot, sum kommunustýrið ikki tekur við, skulu fylgja við uppskotinum, tá ið hetta verður sent landsstýrismanninum til góðkenningar. Stk. 3. 1) Landsstýrismaðurin kann, tá ið mett verður, at eitt uppskot eigur at verða broytt í einum ella fleiri førum, áðrenn tað kann verða góðkent, gera av, at kommunustýrið av nýggjum skal leggja uppskotið við teim ætlaðu broytingum fram til alment eftirlits aftaná kunngerð eftir reglunum í stk. 1. Stk. 4. Somuleiðis kann kommunustýrið, tá ið tað, orsakað av innkomnum mótmælum ella broytingar-uppskotum, hevur samtykt at broyta hitt upprunaliga uppskotið, fáa í lag, at uppskotið við hesum broytingum verður framlagt av nýggjum. Stk. 5. 1) Viðvíkjandi uppskotum, ið viðgjørd verða eftir reglunum í § 4, stk. 4, avger landsstýrismaðurin, nær og hvussu hesi uppskot skulu verða framløgd til eftirlitið umrøtt í hesi grein.*

2. Umsitingin mælir til, at umframt at Tvøroyrar býráð viðgerð og tekur støðu til innkomin mótmælir og broytingaruppskot hvør sær í serstakari málsviðgerð, viðgerð og tekur støðu til endurgjald til verandi neystaeigarar, ið hava beinleiðis mark til ætlaðu broyting, og harvið beinleiðs verða raktir og skerdir til neystavirksemið, vísandi til áseting um endurgjald í:

    *Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022. Endurgjald, § 14. Tá ið eitt øki samsvarandi byggisamtykt er lagt av til almenn hús ella virki, ella er ætlað til vegir, torg ella annað sovorðið og ognarmaður tess eftir meti metingarnevndarinnar smbr. § 15 missir møguleikan at nýta teir fyrimunir, ið økið hevur á rímiligan og forsvarligan hátt sammett við, hvussu grannaøkini í roynd verða nýtt, kann ognarmaður krevja, at kommunan skal taka økið fyri endurgjald Stk. 2. Er økið bara ein partur av ognini, og vil avhendingin fáa tað í § 13 nevndu ávirkan á tann partin, ið eftir er, kann kravið um ognartøku kommununar umfata alt økið, sum tað er.*

**Býráðið 27. april 2023:**
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við tilmælið frá Vinnu- og Havnanevndini, Teknisku nevnd og Trivnaðarnevndini um at halda fast í býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um broyting av byggisamtyktinum og viðkan av havnarlagnum, tó so, at mælt verður til at tillaga orðingin í D: Havnarøki stk. 4 til: «*Eingin partur av útveggi ella tekju má vera hægri enn 11,5 m, tó kunnu neyðugir tekniskir húsalutir vera hægri eftir nærri góðkenning býráðsins. Goymslubrunnar kunnu í mesta lagi vera 20 m høgir, og skorsteinar í mesta lagi vera 60 m høgir. Slik hægri bygging skal altíð sendast til almennar hoyringar.*» -Einmælt samtykt

**34/23**

**22/00178-9 Umsókn um broyting av byggisamtykt - bygging á matr. nr. 68 í Tjaldavík, sunnan fyri gamla landsvegin.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 30.03.2022 | 9/22 |
| 2 Tekniska nevnd | 09.05.2022 | 27/22 |
| 3 Býráðið | 20.02.2023 | 11/23 |
| 4 Býráðið | 27.04.2023 | 34/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 24.03.2022**
Umsitingin hevur fingið ein fyrisp. frá . um møguleikið er fyri at fáa byggiloyvið á matr. Nr. 68 í Tjaldavík. Umsøkjarin hevur vitja Tekniskudeild, har hann hevur presentera ætlanina, og ynskir hann, áðrenn meira tíð og orka verður lagt í verkætlanina, at framleggja hesa fyri býráðnum, og hoyra um ætlanin evt. kann gjøgnumførast.

Tvøroyrar kommuna kann ikki loyva bygging á matr. nr. 68 samb. byggisamtyktini fyri Tvøroyrar kommunu, tá hetta liggur í fríøki "H"

**§ 34: Øki H: Frílendi**

1) Frílendi eru lendi, sum ikki má byggjast á. Lutvíst eru tað lendi, sum løgd eru av til varðveitingar av náttúru, fornminnum o.t. og til at fríðka bygdina og gera hana dámligari at búgva í, og lutvíst eru tað øki, sum ikki tørvur er á at taka undir bygging í hesi syftu.
2) Á teimum í 1. stk. nevndu økjum mugu bert verða gjørdir gonguvegir. Broytingar í plantingini kunnu bert fara fram, tá ein nýtingar- og plantingarætlan er gjørd og góðkend fyri eitt natúrliga avmarkað størri øki.

3) Útstykking má ikki fara fram.
4) Økispartarnir kunnu nýtast til landbúnað, men eingin bygging má fara fram.
5) Gomul neyst og aðrar gamlar smábygningar við søguligum virði kunnu tó umvælast ella endurreisast soleiðis sum tey vóru fyrr, eftir loyvi frá avvarandi myndugleikum, herundir serlovyi frá býráðnum. Umvældur ella endurreistur bygningur, kann ikki nýtast til endamál sum ikki frammanundan er loyvt í fríøkinum.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 19 frá 18. mars 2013

Galdandi byggisamtykt fyri Tvøroyrar kommunu

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2022 -Ongin játtan avsett

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið býráðnum til støðutakan.

**Býráðið 30. marts 2022:**
var á fundinum og greiddi nærri frá um ætlanina. Kristin Michelsen mælir til at málið verður beint í Tekniskenevnd, sum kannar um møguligt er at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 68, Øravík, frá verandi fríøkið til ístaðin vera øki "L" "Frítíðarhús og kamping økið". Einmælt samtykt

**Tekniska nevnd 09. maj 2022:**
Nevndin mælir til at broyta samtyktina fyri økið til: "L" "Frítíðarhús og kamping økið".

**Býráðið 20. februar 2023:**
Einmælt samtykt tilmælið hjá teknisku nevnd.

**Kommunustjórin 26.04.2023:**
Kunngerð um broyting av byggisamtykt fyri "L" "Frítíðarhús og kamping økið", hevur ligið alment frammi til eftirlit á kommunuskrivstovuni samb. Løgtingslóg nr. 13 frá 21. mai 1954 um býarskipanir og byggisamtyktir, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 31 frá 17. mars 2022.

> *§ 6. 1) Áðrenn uppskot um byggisamtykt verður sent landsstýrismanninum, skal tað verða lagt fram í minsta lagi 3 vikur til alment eftirlits á einum fólki atkomuligum staði. Kommunan skal frammanundan á vanligan hátt kunngera, at byggisamtyktin er framløgd til eftirlits, og kunngerðin skal skila til, hvørt økið tað er, ið uppskotið umfatar. Mótmæli móti uppskotinum, og broytingaruppskot mega verða send kommunustýrinum, áðrenn 6 vikur eru liðnir frá kunngerðardegnum*

Tá freistin var farin kann staðfestast, at einki mótmæli ella broytingaruppskot er móttikið.

**Býráðið 27. april 2023:**
Borgarstjórin kunnar um, at tá freistin var farin kann staðfestast, at einki mótmæli ella broytingaruppskot er móttikið til ætlaðu broyting av byggisamtykt - bygging á matr. nr. 68 í Tjaldavík, sunnan fyri gamla landsvegin.
Borgarstjórin mælir býráðnum til at taka undir við broyting av býráðssamtyktini frá 20. februar 2023 um at broyta byggisamtyktina fyri matr. nr. 68, Øravík, frá verandi fríøkið til ístaðin vera øki "L" "Frítíðarhús og kamping økið". -Einmælt samtykt.

**35/23**
**23/00123-2 Lukka mál:**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 27/23 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 35/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 11.04.2023**

- 
- 

**Líknandi dømi:**

- 
- 

**Lógargrundarlag:**

- 
- 
- 

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til støðutakan.

Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:

Býráðið 27. apríl 2023:

Til kunningar

**<u>9/23</u>**
**<u>23/00044-1 Skattatøl 2023</u>**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 20.02.2023 | 3/23 |
| 2 Býráðið | 20.02.2023 | 3/23 |
| 3 Fíggjarnevndin | 23.03.2023 | 4/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 6/23 |
| 5 Fíggjarnevndin | 24.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 9/23 |

**Málslýsing:** Kommunustjórin 01.02.2023
Til kunning og umrøðu samanbering av skattainntøkum 2022/2023

**Lógargrundarlag:** Kommunustýrislógin

**Fíggjarligar avleiðingar:** FÆ2023/2024

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður við hesum kunning um skattainntøkur latið fíggjarnevndini og møguliga býráðnum til umrøðu/-støðutakan.

**<u>Fíggjarnevndin 20. februar 2023:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Býráðið 20. februar 2023:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**<u>Fíggjarnevndin 23. marts 2023:</u>**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 30. marts 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Fíggjarnevndin 24. apríl 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. apríl 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**10/23**

**23/00141-2 LUM -Kanning av barnaverndartænastunum 2022**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 19.04.2023 | 6/23 |
| 2 Býráðið | 27.04.2023 | 10/23 |

**Málslýsing: Kommunustjórin 16.04.2023**
Umsitingin hevur hin 27.03.2023, móttikið teldupost frá LUM Løgtingssinsumboðsmanni við kunning av kanning av eftirlitsvitjanunum hjá barnaverndartænastunum sambært § 16, stk. 3 í Barnaverndarlógini.

**Lógargrundarlag:** Løgtingslóg nr. 18 frá 8. mars 2005 um barnavernd, sum seinast broytt við løgtingslóg nr. 168 frá 16. desember 2021

**Fíggjarligar avleiðingar:**

**Tilmælið:** Vísandi til kommunustýrisskipanina fyri Tvøroyrar kommunu verður uppskotið við hesum latið sosialunevnd og møguliga býráðnum til kunning/støðutakan.

**Sosiala nevnd 19. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 27. april 2023:**
Málið var umrøtt og kunnað

**11/23**

**21/00149-2 Lukka mál:**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 23.04.2021 | 9/21 |
| 2 Fíggjarnevndin | 20.05.2021 | 24/21 |
| 3 Býráðið | 27.05.2021 | 40/21 |
| 4 Sosiala nevnd | 19.04.2023 | 4/23 |
| 5 Býráðið | 27.04.2023 | 11/23 |

**Málslýsing:**

TVØROYRAR KOMMUNA

**12/23**
**21/00536-2 Lukka Mál:**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Sosiala nevnd | 20.08.2021 | 6/21 |
| 2 Sosiala nevnd | 13.02.2023 | 3/23 |
| 3 Sosiala nevnd | 23.03.2023 | 3/23 |
| 4 Býráðið | 30.03.2023 | 5/23 |
| 5 Sosiala nevnd | 19.04.2023 | 5/23 |
| 6 Býráðið | 27.04.2023 | 12/23 |

**Sosiala nevnd 20. august 2021:**
Kunna

**Kommunustjórin 02.02.2023**

**Sosiala nevnd 23. marts 2023:**

Fundurin lokin kl. 18:30

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

Alvi Mortensen

Jónleyg Jespersen Bech

Bjarni Hammer

Kristina Roest

Jens Arni Leo Hammerfoss